## Glóðheitur Ibisevic

Ein frágreiðing til gongdina hjá Hoffenheim er Vedad Ibisevic, sum hevur skorað 16 mál í fyrstu 14 dystunum fyri Hoffenheim í ár. Í fjør sat hann annars á beinkinum fyri tað mesta, og talan gjørdist bert um fimm mál frá honum, tá Hoffenheim flutti upp. – Eg eri skjótt sjálvur bangin fyri mínum dygdum. Men sjálvsálitið er í topp og á einum slíkum liði er lætt at skora, sigur Ibisevic, sum tykist hava sett kós móti metinum hjá Gerd Müller, sum eitt einstakt kappingarár skoraði 40 mál fyri Bayern München.



## Hoffenheim ikki meistari

Uppflytararnir úr Hoffenheim liggja í løtuni á odda í týsku fótbóltskappingini, men Franz Beckenbauer heldur ikki, at tað fer at eydnast sensatiónsliðnum at vinna kappingina. Der Kaiser roknar ikki við, at Hoffenheim fer at halda í longdini. - Fyrr ella seinni fer luftin úr teimum. Teir verða ikki meistarar í ár, men um teir styrkja liðið, so kunnu teir kanska gerast meistarar um tvey ella trý ár, sigur Beckenbauer.

# litti yrkisspælarin í heiminum



**Litti fótbóltsspælarin, Arthur Wharton gjørdist yrkisspælari longu í endanum av 19. øld. Men húðarliturin gjørdist tíverri eisini ein forðing hjá honum**

FÓTBÓLTUR

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Arthur Wharton varð føddur í Jamestown í Accra á Gullstrondini – tað sum í dag eitur Ghana – 28. oktober í 1865. Tað varð tíðliga greitt, at Arthur Wharton hevði góð læruevnir. Í 1882 flutti hann til Onglands fyri at nema sær lærdóm. Tað gekk ikki long tíð, so staðfesti hann eisini síni evnir innan sprintteinarnar í renning. Í 1886 setti hann met á teininum fyri 100 yards (góðar 90 metrar). Hann rann teinin innanfyri 10 sekund, sum fyri 122 árum síðani varð púrasta óhoyrt. Árið eftir vann hann aftur meistaraheitið hjá The Amateur Athletics Association. Men hann varð eisini stinnur innan aðrar ítróttargreinar. Hann íðkaði eisini cricket, súkkling, og ikki minst fótbólt.

### Yrkisspælari í 1889

Arthur Wharton varð málverji hjá Darlington í Norðureystur-Onglandi í 1885-1886. Her fingu menn úr táverandi stórliðnum, Preston North End eyga á tann unga, evnaríka, litta manningin. Saman við nýggja liðið sínum, rakk Wharton hálvfinaluni í FA Cup kappingini í 1887. Fyrsta FA Cup kappingin varð longu í 1872. Preston tapti hálvfinaluna 1-3 ímóti West Bromwich.

Í 1889 fekk Wharton ein yrkissáttmála við Rotherham Town. Seinni spældi hann eisini við Sheffield United, Stalybridge Celtic og Ashton North End. Seinasta árið, sum yrkisspælari spældi hann við Stockport County í næstbestu fótbóltsdeildini.

Síðsti dysturin hjá honum varð ímóti einum liði úr Manchester, sum æt Newton Heath. Hesir somu Newton Heath skiftu navn hetta árið, til Manchester United. Wharton varð ein ógvuliga fleksibil spælari. Hann boksaði bóltin langt sum málverji, og gjørdi hann tað ofta undirhaldandi fyri áskoðarnar. Hann varð so skjótur, sammett við hinar spælarnar, at tíðum spældi hann sum vongur.

### Øðrvísi spæl

At vera málverji í 1890-árunum varð rættiliga øðrvísi, enn at verða málverji í dag. Málverjar høvdu tá í tíðini loyvið til at nerta bóltin við hondini á leikhálvuni hjá liði sínum. Men samstundis varð málverjin ikki líka væl vardur av dómarareglunum, sum komu í 20. øld.

Hetta merkti, at málverjarnir vóru nógv útsettir, hart taklaðir, og viðhvørt næstan jagstraðir av mótstøðumonnunum. Tað kravdist av einum málverja, at hann bæði dugdi at verja seg, og at geva frá sær eisini. Wharton stóð seg rættiliga væl í hesum partinum, og bleiv hann tí væl dámdur av áskoðarunum. Men ikki øll hildu líka nógv um hansara stíl.

Í 1887 fór ein greinaskrivari í blaðnum "The Athletic Journal" rættiliga illa við tí litta manninum. Hesin helt, at ein slíkur flákrandi fuglur hoyrdi ikki heima millum tvær málstengur.

Í dysti fyri Rotherham ímóti Sheffield Wednesday gjørdi Wharton nakað, sum fær okkum at hugsa um tann svaka málverjan hjá Kolumbia, René Higuita. Wharton hekk seg í yvirleggjaran, fangaði bóltin millum bæði beinini, og skákaði sær undan trimum mótstøðumonnum, sum allir fóru sendandi inn í málið. Fólk, sum vóru til staðar tann dagin, gloymdu ongantíð tað bjargingina.

Men tað gekk ikki bara við hjá Wharton. Tá hann spældi í Sheffield United hevði hann ein beinharðan kappingarneyta, sum æt William Foulke. Tá so Wharton slapp at byrja inni í dysti fyri Sheffield United ímóti Sunderland á gamla Roker Park Leikvøllinum, kom hann skeivt út úr málinum, og náddi slettis ikki bóltinum, so Sunderland fekk skorað.

### Yrkisítrótt illa lýdd

Seinast í 19. øld vóru tað fleiri fólk, sum hildu fast við, ítróttur skuldi bara verða á amatørstøði, og at tað varð skeivt at íðka ítrótt fyri pening.

Arthur Wharton vaks upp hjá einari familju, sum varð av meðalstættini í kolonistiska umhvørvinum á Gullstrondini. Tað varð mett sum eitt sosialt afturstig í hesum umhvørvinum, at Wharton fór at íðka yrkisítrótt. Tað varð mett at verða óhóskandi, at ein maður í miðalstættini íðkaði ítrótt fyri pening.

Wharton royndi at fáa eitt embætisstarv á Gullstrondini, tá fótbóltsyrkisleiðin varð liðug í 1902. Men tað vísti seg, at tað varð júst hansara yrkisítróttarleið, sum forðaði honum í at fáa eitt embætisstarv í føðilandinum. Wharton valdi so at gera seg til eitt við arbeiðarastættina, sum tá á døgum eisini varð stættin, sum hevði áhuga í fótbólti. Wharton fór at arbeiða í einari kolaminu í Edlington í Suður-Yorkshire.

Hann gjørdist eisini ein hetja hjá arbeiðarastættini, men tíðum varð hann eisini út fyri rasismu. Men hann fann seg ikki í at verða spiltan út fyri sín húðalit. Hann svaraði aftur og vardi seg. Hann varð ein stoltur maður, men ikki arrogantur.

Tó meta nógvir fótbóltssøgufrøðingar, at tað varð júst húðaliturin, sum gjørdi, at Wharton ongantíð varð tikin út til enska landsliðið.

### Dámdi váta slagið

Sum so mong onnur yrkisítróttarfólk, so hevði Arthur Wharton tað ringt við at flyta seg frá teimum stóru leikvøllunum við teimum mongu áskoðarunum, og tí nógvu umtaluni, og út í gloymskuna.

Longu tá hann ikki vann málmanssessin frá William Foulke í Sheffield United byrjaði hann spakuliga at dreka. Tó helt hann seg í gongd tey fyrstu árini, aftaná, at fótbóltsskógvarnir vórðu lagdir á hillana við at íðka cricket og renning. Undir fyrra heimskrígnum gjørdist hann partur av sivilverjuni. Men, sum hann eldist, so føldi hann seg gloymdan og forfjónaðan, og fór hann at drekka seg á ørmundarhús.

Tá Arthur Wharton doyði í Edlington, tann 13. desember í 1930, átti hann ikki eitt klovið oyra. Hann varð jarðaður í einum kirkjugarði í Edlington, men hann fekk ein gravstein uttan navn.

### Kom til heiðurs aftur

Men seinast í 20. øld, tá alsamt fleiri littir fótbóltsspælarar byrjaðu at gera vart við seg í ensku liguni, kom navnið hjá Wharton undan kavi aftur. Hetta varð tá finnast skuldi fram, hvør varð tann fyrsti litti yrkisspælarin í Onglandi.

Tá so antirasismu-herferðirnar eisini komu á breddan í fótbóltsumhvørvinum undir herrópinum "Football Unites – Rasism Devides" (Fótbóltur savnar – Rasisman spjaðir) kom Arthur Wharton aftur til heiður og æru.

Í 1997 fekk grøvin hjá honum ein prýðiligan gravstein. Og í 2003 gjørdist Arthur Wharton partur av "English Football Hall of Fame"-savninum, sum eina viðurkenning fyri hansara fótbóltsbrøgd.

Í hesum døgum verður eisini arbeitt við at gera eina standmynd av honum í Darlington sum eina viðurkenning fyri hansara avrik.